ítróttur
Nr. 170 • mikudagur • 10. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Møguleikin at vinna er størri enn nakrantíð

**Landsliðsvenjarin ásannar, at tað ivaleyst verður meiri pláss at spæla á í kvøld, enn tað so ofta áður hevur verið, men hann umhugsar ikki at seta Jón Róa Jacobsen longri fram á vøllin fyri at geva álopspartinum størri tyngd**

FØROYAR–LITAVA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*– Vit vilja fegnir hava meiri skjótleika í álopsspælið. Christian Høgni Jacobsen er komin aftur eftir leikbannið, og tað er væl hugsandi, at hann verður í álopinum hesa ferð, sigur Henrik Larsen*

Í kvøld verður punktum sett fyri leiklutin hjá Føroyum í fjórðu EM undankappingini, síðani minniliga mikukvøldið í Landskrona í ovurmorgin fyri trettan árum síðani.

Vónin hevur alla tíðina verið, at tað skuldu eydnast at vinna ein sigur. Tað var tætt við í fyrstu royndini, sum var 6. september í fjør á heimavølli ímóti Skotlandi. Síðani hevur tað fleiri ferðir verið tætt við, men mótstøðuliðini hava síðstu løtuna verið ov boysin, og nú er síðsti møguleikin.

Fyritreytirnar ímóti Litava áttu at verið toluligar. Leikluturin hjá Litava er liðugur. Teir eru vónbrotnir, fleiri spælarar, sum hava verið við til at manna liðið, eru ikki við í Føroyum, og litavar hava longu fest eyguni ímóti HM undankappingini, sum tað verður farið undir næsta heyst.

Litava er nuimmar 93 á FIFA listanum, og Føroyar eru nummar 118. Harvið er Litava í útgangsstøðinum favorittur, men teir eru minsti favoritturin, um tað ber til at siga tað soleiðis, sum hevur verið í Føroyum í hesi EM undankappingini.

## Sama konseptið

Fyrrapartin í gjár legði landsliðið í fagrasta summarveðrið á Svangaskarði síðstu hondina á fyrireikingarnar til síðstu uppgávuna í hesi EM undankappingini. Hýrurin var framúr góður, men á venjingini sást ikki, hvussu liðið fer at síggja út í kvøld.

Henrik Larsen ásannar, at møguleikin fyri at vinna kann tykjast størri hesa ferð, enn hann hevur gjørt undanfarnu ferðirnar, men hann hevur ongar ætlanir um at leypa við báðum beinum í álopsgrøvina.

– Vit halda okkum til sama konseptið, sum vit hava gjørt higartil. Vit sóu fyri einum ári síðani á útivølli, at teir eiga eitt gott fótbóltslið. Sum eg havi skilt tað, so eru teir farnir undir fyrireikingarnar til næstu undankappingina. Nýggir spælarar fara ivaleyst at fáa møguleikan, og teir verða uppsettir at vísa, at tað eru júst teir, sum tað skal satsast uppá.

Tú roknar við at fáa meiri pláss at spæla á?

– Teir spæla heilt øðrvísi á heimavølli og útivølli, so tað kann væl vera, at teir verða meiri verjukendir, enn t. d. Týskland var, tá ið teir vóru her. Vit fáa altíð møguleikar at gera mál. Tað ræður um at taka av, og so at halda tætt í verjuni.

Hevur tú umhugsað at flyta Jón Róa Jacobsen longri fram á vøllin?

– Tað kemur ikki upp á tal. Miðverjan er trygg, og hon verður, sum hon hevur verið. Jón Rói plagar at fara onkran túrin fram eftir vøllinum, og tað fer hann ivaleyst eisini at gera í kvøld.

Umhugsar tú broytingar í álopinum?

– Vit vilja fegnir hava meiri skjótleika í álopsspælið. Christian Høgni Jacobsen er komin aftur eftir leikbannið, og tað er væl hugsandi, at hann verður í álopinum hesa ferð, sigur Henrik Larsen, sum leggur afturat, at tað er væl hugsandi, at onkrar aðrar broytingar fara at verða gjørdar.

Súni Olsesn er tøkur aftur eftir skaðan, sum helt honum burtur leygardagin. Hann verður vinstri vongverji, og so er spurningurin, hvørjar aðrar broytingar fara at verða gjørdar. Venjararnir báðir vóru sera væl nøgdir við avrikið hjá Jann Inga Petersen á høgra vongverja. Tí er ikki púra upplagt, at Pól Thorsteinsson soleiðis uttan víðari verður fluttur úr vinstru og yvir aftur í høgra borð.

## Ikki spenna ov høgt

Venjararnir og spælararnir vilja ógvuliga fegnir geva áskoðarunum eitt gott fótbóltsupplivilsi. Teir eru greiðir yvir, at besta upplivilsi verður sigur á Litava.

Men teir fara at vísa tol og ikki leypa framav. Tað ræður um at hava ta virðingina fyri mótstøðumonnunum, sum skal til.

At satsa meiri álopskent, enn tað hevur verið vanligt, hevur onkra ferðina kostað nógv á heimavølli. Besta dømið um hetta er tíggju ára gamalt. Tá lá í luftini, at Føroyar skuldu vinna á Svangaskarði ímóti Kypros, sum var umleið eins nógv høgri á styrkislistanum, sum Litava nú er frammanfyri Føroyar. Álopsbogin varð spentur, og hann brast.

Nógv vatn er runnið í ánna seinastu tíggju árini. Leikliga er føroyska liðið nógv betri fyri nú. Tað hevði verið ógvuliga hugaligt, um tað í kvøld hevði eydnast at fingið fulla úrtøku ímóti Litava og harvið sagt virðiligt farvæl við hesa EM undankappingina og at sæð við spenningi fram ímóti næstu HM undankappingini.

# Óli hvílir seg

**Liðformaðurin, sum ikki luttók í venjingini í gjár, roknar við torførari avbjóðing, sum hann vónar, at nógvir áskoðarar fara at hjálpa føroyska liðnum at taka sær av**

FØROYAR–LITAVA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Liðformaðurin og royndasti spælarin á føroyska landsliðnum, Óli Johannesen, spenti frá, meðan liðfelagarnir tuskaðu í góðveðrinum á Svangaskarði fyrrapartin í gjár. Ein lítil vøddaskaði í lærinum argar, men tað verður roknað við, at Álvur Hansen og Fanny Petersen fara at fáa pjøssa lyklaspælaran í miðverjuni so mikið, at hann verður førur fyri at spæla í morgin.

Hvussu eru vónirnar?

– Vit eiga kanska at hava betri møguleikar, enn vit hava havt ímóti teimum stóru. Men Litava eigur eitt gott fótbóltslið. Tað hava vit fleiri ferðir sjálvir kent. Eg minnist serliga aftur á dystin á útivølli ímóti teimum fyri fimm árum síðani. Dysturin endaði málleysur, men eg haldi ikki, at eg nakrantíð fyri ella síðani havi kent meg undir sovornum trýsti sum ta ferðina og havi kent meg so móðan, sum eg var eftir ta uppgerðina.

Óli Johannesen sigur seg vera spentan uppá, hvussu nógvir áskoðarar fara at møta upp í kvøld og sum fara at taka undir við føroyska liðnum.

– At áskoðararnir eru við okkum hevur alstóran týdning. So stóran týdning sum nevyan nakar, ið er uttanfyri vøllin, kann ímynda sær, at tað hevur fyri okkum á vøllinum, sigur liðformaðurin Óli Johannesen.



# John í felag við fimm øðrum limum

**Skotlands dysturin í fjør og tann í Jugoslavia fyri sjey árum síðani eru millum dystirnar, sum standa fremst í huganum hjá toppskjúttanum millum teirra, sum nú manna landsliðið**

50 LANDSDYSTIR
*Jóannes Hansen*



*Dysturin móti Skotlandi í fjør er sjálvandi ein av teimum, sum John Petersen minnist best*

Í kvøld fer John Petersen, sum er 31 ára gamal, at spæla fyri 50. ferðina á landsliðnum. Harvið verður hann sætti føroyingurin, sum hevur spælt fimmti ferðir á fótbóltslandsliðnum. Hinir eru Óli Johannesen, sum undan dystinum í kvøld hevur verið við í 63 landsdystum, Jens Martin Knudsen (58), Allan Mørkøre (54), Julian S. Johnsson (53) og Øssur Hansen, sum hevur spælt 51 landsdystir.

Tað eru átta ár síðani, at John Petersen fyrstu ferð var á landsliðnum. Tað var 11. oktober í 1995, tá ið Føroyar vunnu EM undankappingardyst í San Marino 3–1. Todi Jónsson, sum hevði skorað øll trý málini, var eitt sindur skaddur, og John Petersen loysti hann av, tá ið tað restaðu sekstan minuttir. Síðani tá hevur John bara verið burtur frá landsliðnum í seks dystum.

John Petersen hevur skorað seks mál á landsliðnum. Tað fyrsta var í Beograd 24. apríl í 1996, tá ið John fyri fyrstu ferð var á liðnum frá fyrsta bríksli. Ta ferðina heilfluktaði hann eitt sera vakurt mál í 3–1 tapinum. Hann hevur skorað eina ferð ímóti Sveis, eina ferð ímóti Kasakstan, og so hevur hann skorað trý mál ímóti Skotlandi. Fyri einum ári síðani skoraði hann tvey á Svangaskarði, og í 1998 umsetti hann brotsspark til mál í Aberdeen. Tað eru bara Todi Jónsson (9) og Uni Arge (8), ið hava skorað fleiri mál fyri Føroyar í altjóða skrásettum landsdystum, enn John Petersen hevur gjørt.

## Fremst í huganum

John Petersen dylir ikki, at hann altíð hevur kent tað sum stóran heiður og eisini góða avbjóðing at umboða Føroyar. Síðani hann fyrstu ferð varð úttikin, hevur hann bara seks ferðir verið burturfrá. Hann var ikki við á venjingarleguni á Kypros í 1996, tá ið Føroyar spældu ímóti Estlandi og Aserbadjan, hann var skaddur, tá ið Føroyar spældu ímóti Andorra í 1999, hann var ikki við á venjingarleguni í Spania í 2000, tá ið Føroyar spældu ímóti Íslandi og Finnlandi, og tá ið mótstøðuliðið í kvøld, Litava, var í Føroyum 8. september í 1999, var John leikbannaður.

Hvønn dyst minnist tú best av øllum?

– Tað hevur altíð verið hugaligt at spæla á landsliðnum, og tað hava verið nógvar spennandi avbjóðingar. Ikki minst tá ið vit hava spælt ímóti teimum størstu í Europa. Tað ferðina tá ið eg fyrstu ferð var millum teir fyrstu ellivu í Beograd í 1996 stóð leingi fremstur í huganum. Ta ferðina var eg so heppin at skora fyri fyrstu ferð. Heimadysturin ímóti Skotlandi í fjør var sjálvandi minnisríkur fyri meg. Tað var hugaligt at skjóta tvey mál, men tá ið eg hugsi aftur á ta uppgerðina, so rennur støðan ofta fram fyri meg, tá ið eg hevði møguleikan at økja til 3–0. Um tað hevði eydnast, so høvdu vit ivaleyst vunnið ta ferðina, heldur John Petersen, sum metir møguleikan fyri sigri í kvøld at vera stóran:

– Í hesi EM undankappingini hava vit ongantíð havt betri møguleika at vinna, enn vit hava í kvøld. Leikluturin hjá Litava er liðugur. Teir eru vónbrotnir, tí teir høvdu vónað at hava møguleika at sleppa upp í part í Portugal. Tað eigur at ávirka teir skeiva vegin. Hjá okkum eigur tað at vera heilt øðrvísi. Vit hava longst eftir at vinna, og vit fara heilt víst eftir sigrinum hesa ferð. Tað skylda vit føroyskum fótbólti, áskoðarunum og eisini okkum sjálvum, sigur ein bjartskygdur John Petersen.

# Nógvar nálir á Svangaskarði í kvøld

**FSF hevur bjóðað øllum teimum, sum hava spælt fleiri enn 25 altjóða skrásettar landsdystir, at koma á Svangaskarð í kvøld at fáa handaða minnisnálir**

LANDSLIÐSJUBILEUM
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Spælararnir hava longst eftir tí, og nú hevur Fótbóltssambandið gjørt upp við seg sjálvt, hvussu tað skal ganga fyri seg. Spælararnir hava spurt og bíðað eftir, hvussu FSF ætlar at markera tað, tá ið spælarar hava spælt 25 og 50 landsdystir. Í góðmeintari provokatión hevur elsti maður á garði, Jens Martin Knudsen, tær seinastu ferðirnar, tá ið spælarar hava hildið rundan dag á landsliðnum, hildið røðu fyri teimum og síðani handað teimum eina skeið, tá ið teir hava spælt 25 landsdystir og ein gaffil, tá ið teir hava spælt 50 landsdystir. Knívin hava landsliðsspælararnir skemtað við, at ætlanin hevur verið, at teir skulu fáa, sum røkka heilt upp á 75 landsdystir.

Men nú verður ikki neyðugt við hesum skemtinum longur. Í FSF er avgjørt, at allir spælarar, sum umboða Føroyar, fáa bronsunál. Teir, sum røkka 25 landsdystum, fáa silvurnál, og teir, sum røkka hálvt hundrað landsdystum, fáa gullnál. Skapið á nálini er FSF búmerkið við rundingi kring seg.

Á ferðini í Skotlandi fingu teir átjan, sum vóru har niðri, bronsunálina. Í kvøld er ætlanin, at teir og so nógvir aðrir skulu fáa sínar nálir.

– Vit eru sera fegnir um, at hetta nú er komið upp á pláss. Nú fyrsta stigið er tikið, fer hetta í framtíðini at vera ein partur av tí, tá ið landsliðið fer at spæla, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

## Seks gull og fimtan silvur

Nógvir núverandi og fyrrverandi landsliðsspælarar hava fingið innbjóðing um at koma á Svangaskarð í kvøld. Ætlanin er, at nálirnar skulu handast í steðginum í landsdystinum. Í hvussu so er teir, sum hava spælt 25 landsdystir og fleiri enn so, fara at fáa nálirnar handaðar persónliga.

Gullnálina fara umframt Óla Johannesen, Jens Martin Knudsen, Julian S. Johnsson og John Petersen, sum eru á liðnum í kvøld, eisini Allan Mørkøre og Øssur Hansen at fáa. Teir eru ikki longur landsliðsspælarar, men teir eru bodnir til handanina av gullnálini.

Umframt teir omanfyri nevndu eru tað fimtan spælarar, sum hava rokkið 25 landsdystum og harvið fáa silvurnálina. Teir eru Jens Kristian Hansen (44), Todi Jónsson (43), Jan C. Dam (39), Kurt Mørkøre (37), Uni Arge (37), Henning Jarnskor (35), Jan Allan Müller (34), Jákup Mikkelsen (32), Pól Thorsteinsson (30), Jákup á Borg (29), Kári Reynheim (27), Tummas Eli Hansen (27), Magni Jarnskor (27), Jóannes Jakobsen (25) og Jens Erik Rasmussen (25).

## Tveir hava fingið fastatøkur

Í alt hava 86 spælarar umboðað Føroyar í altjóða skrásettum landsdysti. Tjúgu teirra hava bara eina ferð verið á vøllinum sum landsliðsspælarar. Allir teir, sum ikki vera á Svangaskarði í kvøld, fara at fáa nálir sendandi næstu dagarnar.

Teir báðir síðstu á altjóða listanum eru Tór–Ingar Akselsen og Christian Lamhauge Holst, sum vóru fyrstu ferð á landsliðnum í Skotlandi leygardagin. Teir vóru ávikavíst nummar 85 og 86.

Sjey spælarar hava í ár verið á landsliðnum fyri fyrstu ferð. Føroyar hava spælt tveir vinardystir ímóti Kasakstan, og dysturin í kvøld verður fimti EM undankappingardysturin í ár. Eingin spælari er millum teir nítjan, sum eru við í fyrireikingunum til uppgerðina í kvøld, og sum ikki hevur verið á vøllinum áður.

Teir sjey spælararnir, sum fyri fyrstu ferð hava fingið møguleikan í ár, eru – umframt Tór–Ingar Akselsen og Christian Lamhauge Holst – Jann Ingi Petersen, Símun Samuelsen, Ingi Højsted, Atli Danielsen og Jónhard Frederiksberg. Um Tór–Ingar og Christian fara at býta seg fastar á liðnum er tað ov tíðliga at vita nakað um enn. Av hinum fimm er tað fyrst og fremst Jann Ingi Petersen, sum rættuliga eru komin í hitan. Atli Danielsen tykist eisini at hava gott tak í landsliðshópinum.